# Laksavirkið í Vági hongur í kløónum tráði

**Heri Hjelm ásannar, at støðan hjá laksavirknium í Vági er ógvuliga hættislig, nú Pan Fish er komið í álvarsligar trupulleikar, men kortini er hann bjartskygdur**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*



*Stórar vónir vórðu settar til tað nýggja, framkomna laksavirkið í Vági. Men tað hevur gingið trupult og nú er høvuðseigarin á veg at fara á heysin, so tað fer at standa ógvuliga nógv á tað komandi árið, sigur Heri Hjelm*

**Vágur:** Støðan hjá spildurnýggja og ógvuliga framkomna laksavirkinum í Vági er alt annað enn góð.

Tað ásannar Heri Hjelm, stjóri á virkinum.

Alivirkið hjá Hera Hjelm í Vági, er eitt av virkjunum í Føroyum, sum Pan Fish eigur ein stóran part av og nú norska stórfelagið er í álfvarsligum trupulleikum, veit Heri Hjelm ikki, hvar hann flýtur.

– Støðan er ógvuliga ógreið og vit vita onki, hóast eg haldi, at ein glotti er fyri framman.

Heri Hjelm sigur, at Pan Fish eigur 33% av alibrúkinum á sjónum og meiri enn helmingin av virkinum á landi.

Og hann ásannar, at støðan er ógvuliga trupul.

### Ógvulig harða byrjan

Eitt er tað, at laksavirkið hevur verið fyri fleiri álvarsligum bakkøstum.

Bæði á jólum í fjør og í vár mistu teir fisk í hundraðtúsundatali, tá ið aliringar slitu í óveðri og aftur nú í heyst fór ein ringur til botns, men missurin hesuferð var ikki so stórur, sigur Heri Hjelm.

Og omaná alt fekk hann eisini ILA í eitt av brúkunum.

Alt hetta førdi til, at alt fólkið varð sagt upp nú ímóti ársenda og ætlanin var so at taka virksemið uppaftur ímóti sumri.

Arbeitt verður eitt sindur hesa vikuna afturat, so verður lagt stilt.

Men nú Pan Fish er komið í álvarsligar trupulleikar veit hann onki, men hann er bjartskygdur av nátúr og hann vónar, at tað fer at bera til at finna eina loysn, so at Pan Fish kann halda fram.

Partabrøvini í Pan Fish eru rapa í botn og felagið er í veruleikanum farið av knóranum.

– Í løtuni liggur í kortunum, at bankarnir yvirtaka Pan Fish og leggja ein part av skuldini um til partapening.

Heri Hjelm sigur, at hendir tað, sær tað ikki so galið út, tó at tað verður ein stórur missur hjá partaeigarunum og eisini honum sjálvum.

– Tað hevði verið øgiliga gott fyri Pan Fish og sostatt eisini fyri okkum.

### Fer at standa nógv á

Hann heldur, at bankarnir vilja treyðugt lata Pan Fish fara á húsagang, tí so missa teir fimm milliardir og tí vilja teir royna at avmarkað tapið so nógv sum gjørligt.

Fer Pan Fish á heysin, fer samstundis alt virksemið, sum teir eru uppi í, fyri bakka og verður selt.

Tí hevði tað verið ein góð loysn, soleiðis sum støðan nú er, at bankarnir umskipaðu ein part av skuldini til partabrøv sum teir síðani kunnu selja aftur, so hvørt.

Men at tað so verður við nýggjari leiðslu og nýggjari nevnd, eru øll greið yvir.

Og Heri Hjelm veit ikki enn, hvørja hugsan nýggja leiðslan og nevndin í felagnum fer at hava um virksemið í Føroyum.

– Vit hava havt so ringa byrjan, at tað gongur ikki uttan so, at eigararnir spjaða til. Og hugburðin hjá møguligum nýggjum eigarum til tann spurningin, kenna vit ikki.

Tað einasta, hann veit, er, at tað er ávísur áhugi fyri maskinunum á laksavirkinum í Vági.

– Vit hava ikki megnað at goldið maskinurnar, so tað hevur Pan Fish gjørt. Norðmenn hava verið í Vági og hugt eftir maskinunum. Og kemur nýggja leiðslan í Pan Fish til ta niðurstøðu, at maskinurnar gera størri gagn onkra aðrastaðni, kann alt henda, eisini at maskinurnar verða tiknar úr virkinum og fluttar onkra aðrastaðni.

– Í løtuni er bara at bíða og vóna tað besta, leggur hann afturat.

– Hóast eg vænti, at tað fer at laga seg, er ikki yvir at dylja, at tað fer at standa nógv á tað komandi árið, tí vit fingu so ringa byrjan og so at hetta kom afturat.

– Í øllum førum vónar hann ikki, at teir fáa ILA at berjast við aftur, so so verður ikki gott. Tí royna teir at koppseta fiskin.

Pan Fish eigur nógv í alivinnuni í Føroyum. Eigur støðan nú at fáa okkum at umhugsa støðuna viðvíkjandi útlendskum pengum í vinnulívinum í Føroyum.

– Tað veit eg ikki, tí kann bara tíðin vísa. Men eitt er so vist, at var útlendskur peningur ikki uppií, varð virkið als ikki bygt yvirhøvur. Sjálvi hava vit ongan møguleika at byggja eitt virki sum hetta, tí tað hevur ikki sæð sín líka áður.

– Og vit mugu eisini staðfesta, at tað hevur riggað ómetaliga væl. At tað so blivu so nógv bakkøst er ein onnur søga, sigur Heri Hjelm.

# Ruðuleiki at leggja Smyril og Norrønu í miðbýin í Havn

**Smyril Line og Strandferðslan eru samd um, at tað er burturvið at gera atløgupláss til nýggju Norrønu og nýggja suðuroyarskipi í miðbýnum í Havn, tí tað fer at føra til ruðuleika í ferðsluni**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*Tað er longu sum er, ruðuleiki, tá ið ferjurnar koma til havnar og tá ið nýggja Norrøna og nýggja Suðuroyarskipið koma, fer tað at føra til ruðuleika, heldur Reidar Nónfjall, sum harðliga saknar eina yvirskipaða ætlan*

**Tórshavn:** Tað er heilt burturvið at byggja Tórshavnar Havn út fyri at gera atløgupláss til nýggju Norrønu og nýggja Smyril í miðbýnum Í Havn.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni sigur, at tað eru bæði Strandferðslan og Smyril Line samd um.

Hann sigur, at bæði Strandferðslan og Smyril Line hava heldur mælt býráðnum til at kanna eftir um tað ikki ber til at finna eina loysn inni á Sundi, so at skipini kunnu brúka havnarlagið har, heldur enn at kroysta skipini inn í hjartað á Havnini.

Reidar Nónfjall sigur, at eitt er, at vanliga verður sagt, at eitt skip skal hava tríggjar til fimm ferðir breiddina av plássið fyri at hava heilt góðar umstøður til at manøvrera og tað hevur nýggja Suðuroyarskipið ikki, har ætlanin er at leggja tað nú.

– Eitt heilt annað er, at tað verður ruðuleiki í ferðsluni, tá ið tey bæði nýggju skipini verða á Havnini ísenn.

– Tað er longu ruðulleiki í ferðsluni sum er og vit vita við vissu, at tað verður nógva ferðir verri, tá ið tey bæði nýggju skipini fara í sigling, tí øll ferðsla frá skipinum og til skipið skal avgreiðast upp á einar tveir tímar og tað vita vit fer at elva til alstórar trupulleikar. At parkera bilar aðrastaðni í Havnini, sum skulu við skipunum, trýr hann ikki nogv uppá.

– Ein spurningur er, hvørja støðu Ráðið fyri Ferðslutrygd og Løgreglan hava til at vegirnir nú skulu brúkast til parkeringspláss hjá bilum, ið skulu við Norrønu

Ein annar spurningur, ið summi seta sær, er, hvussu tað verður at greiða einum fransmanni týskara ella dana, sum skal við Norrønu, frá, at hann skal stilla seg at bíða í Gundadali ella á Oyggjarvegnum.

Hann sigur, at hann veit ikki, um tað ber til at finna eina loysn á Sundi.

Men hann heldur at tað er skeivt, at møguleikin ikki verður kannaður út í æsir, tí Sund er uttanfyri Havnina, har er nógv pláss og øll ferðslan, sum skal norðureftir sleppur frá at koyra ígjøgnum Havnina. Samstundis kann ferðslan, sum skal til Havnar, greinast sundur eftir teimum ymsu ringvegunum, so at trýstið á vegirnar inni í býnum ikki verður størri enn neyðugt, tí tað er ivaleysa stórt sum er.

### 50-80 ár fram í tíðina

Reidar Nónfjall sigur, at hann vildi mælt til at allir partar seta seg niður og royna at leggja ein langtíðar ætlan, sum røkkur eini 50-80 ár fram í tíðina, sigur Reidar Nónfjall.

Men hann sigur, at ongin tykist at vera áhugaður í eini slíkari viðgerð og tí dugir hann heldur ikki at síggja, at nøkur slík viðgerð er farin fram.

Hann sigur, at tað tykist sum um at hvør kommuna sær fær loyvi til at gera loysnir, sum gagna henni best einsamallari, uttan at hugsað verður um heildina.

Men her heldur hann, at okkum tørvar ein yvirskipaðan politikk á, t.d, ferðsluøkinum, so at tað verður ein samanhangur í tí, sum verður gjørt og soleiðis at tað gagnar heildini.

Men tað er ikki til og hann heldur, at Havnin man vera eindømi, har tað verður útbygt so grovliga mitt í hjartanum á býnum.

– Tað hevði neyvan komið fyri aðrastaðni enn í Havn, at tað varð bygt út til tvey risa skip og har tað bar til at reisa goymslubygningar av stáli og blikki mitt í býnum, eitt hanagleiv frá okkara stjórnarbygningi á Tinganesi, leggur hann afturat.



# D.J. Aligator og Frælsi í dós



**Saman við D. J. Alligator, sum kemur til Føroya millum jólanna, fer James Olsen at framføra »Frælsi í dós-show«**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár fáa Føroyingar høvi at hoyra og síggja heimskenda bólkin DJ Aligator. Síðan hann var í Føroyum seinast – tað var í januar í fjør – hevur hann millum annað havt hitt bæði á Top of The Pops og á MTV.

Tann fyrsta konsertin verður í TB-húsinum á Tvøroyri fríggjakvøldið 27. desembur, har diskotek eisini verður við okkara egna DJ Kristjan Joensen úr Klaksvík.

Seinna tiltakið verður í Mentunarhúsinum í Fuglafirði, har Eyðun & Terji eisin fara at spæla øll teirra hitt úr millum annað Frændum, Føstufressum & Moirae. Sum nakað heilt serligt, fara Kall eisini at lutaka við teirra Frælsi-show við James Olsen og dansarum.

Dentur skal leggjast á, at einki aldursmark er, og at tiltøkini eru frá kl.23.30-04.00.


# Teir tóku land 7

**Føroyingar í Grønlandi**

”Teir tóku land” snýr seg hesaferð um føroyskan útróður og flakavinnu í Grønlandi í sekstiárunum.

Flakavirkið hjá Nordafar fór nú at taka móti fiski úr Grátufjørðinum, Tovkussak og báðum havnunum í Ravnsoynni.

Allir útróðrarmenninir løgdu um frá saltfiski til feskfisk. Samvinnufelagið gavst at samskipa útróður í Grønlandi.

Saltfiskamenninir í Kangarssuk og Borgshavn stovnaðu egið felag. Grønlandsfelagið bygdi eina nýggja røð av deksbátum til útróður í Føroyingahavnini.

Gerandisdagurin hjá útróðrarmonnum verður lýstur, og greitt verður frá, tá ein føroysk genta hvarv í Grátufjørðinum.

Frásøgn er um kendasta føroyingin í Grønlandi, sum var skipari á grønlendska hvalabátinum ”Sonja”.

Fullfíggjað yvirlit er yvir allar útróðrarmenn.






**Jógvan Arge**

SANSIR 355 355


